ítróttur

Nr. 194 • týsdagur • 14. oktober 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Jóannes Jakobsen helst til B36



*Alt bendir á, at Jóannes Jakobsen aftur fer at royna seg sum fótbóltsvenjari komandi kappingarár, og tað sær út til, at tað verður í B36, at hetta skal verða*

**Eftir eitt sabbat-ár hevur fyrrverandi landsliðsskiparin fingið hug til venjarastarvið aftur, og nógv bendir á, at tað verður B36, sum hann skal standa á odda fyri komandi ár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir at hann í fjør hevði tikið um endan í HB, og saman við Kára Nielsen leitt liðið til gullið, bar inniverandi kappingarár einki venjarastarv við sær til Jóannes Jakobsen.

Høvuðsorsøkin til hetta var tó einamest privatar orsøkir, tí fyrrverandi liðskiparin á landsliðnum sá seg ikki hava stundir til at nýta so nógva tíð til fótbóltin, sum eitt venjarastarv í fyrstu deild krevur. Nú er tó líkt til, at umstøðurnar eru betri í so máta, og Jóannes sigur eisini sjálvur, at tað er nógv, sum bendir á, at hann nú aftur fer at royna seg.

- Nøkur feløg hava spurt seg fyri, og sjálvur havi eg eisini góðan hug til hetta, so tað sær út, at eg veri venjari komandi ár. Akkurát hvar, fái eg tó ikki sagt í løtuni, sigur Jóannes um hetta.

## Helst í B36

Eitt av feløgunum, sum treiskar leysasøgur vilja vera við skal vera eftir Jóannes, er B36. Har er enn eingin venjari funnin, men tað tykist í øllum førum ikki ósannlíkt, at hesin verður júst Jóannes Jakobsen.

Á ársveitsluni hjá felagnum leygarkvøldið boðaði formaðurin í B36, Kristian á Neystabø, frá, at Ion Geolgau ikki heldur fram í sessinum, men at tað enn ikki er greitt, hvør verður venjari.

- Hetta er eitt mál, sum vit arbeiða við, og vit hava sjálvandi nøkur nøvn í kikaranum. Meira enn tað fái eg ikki sagt í løtuni, segði formaðurin, tá vit sunnudagin spurdu um viðmerkingar til málið.

Tað skilst tó á prátinum í og kring felagið, at talan helst verður um eina føroyska loysn, og so er í øllum førum nærliggjandi at halda, at talan verður um Jóannes. Aðrir føroyskir venjarar í fyrstu deild í ár hava verið Petur Mohr, Jan Joensen, Jógvan Martin Olsen, Johan Nielsen og Albert Ellefsen, men sum er talar lítið fyri, at tað verður nakar av hesum. Ein møguleiki, sum eisini hevur verið nevndur, er Sigfríður Clementsen, sum hevur roynt seg sum ungdómsvenjari og hjálparvenjari hjá besta liðnum í felagnum. Men enn er hann kanska nakað feskur sum venjari, og hartil hevur hann leikt saman við fleiri av leikarunum, so tað bendir tann vegin, at hann helst má bíða í nøkur ár. Men tað munnu fuglfirðingar helst einki hava ímóti, tó at heldur einki er avgjørt har enn.

# Daiva breyt ringfingurin

**Sigurin sunnudagin kann gerast dýrur hjá VB, tí mitt í seinna hálvleiki var Daiva Toumaite so óheppin at bróta sær ringfingurin á høgru hond, so hon helst má sita uttanfyri fleiri dystir**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

At alt kann hava sín prís, mátti VB sanna sunnudagin, tá toppskjúttin frá undanfarnu kapping, Daiva Toumaite, miðskeiðis í seinna hálvleiki noyddist út við skaða.

Eftir at hon hevði verið hjá lækna aftan á dystin, fekk hon staðfest, at ringfingurin á høgru hond var brotin. Enn er ikki greitt, hvussu hetta kemur at ávirka hennara hondbóltsspæl komandi vikurnar, men í dag skal hon aftur kannast hjá lækna, áðrenn staðfest verður, hvussu drúgvan steðg hon má taka frá hondbóltinum, áðrenn fingurin er lektur aftur.

Men sum skiltist á vágbingum sunnukvøldið, eru vónirnar ikki tær bestu, og roknað verður við, at Daiva noyðist binda frið í nakrar vikur.

Næstu dystirnir hjá VB eru fyrst móti Sóljuni og Kyndli, áðrenn Stjørnan er á skránni fyrst í næsta mánaði. Uttan at nakað skal takast frá teimum báðum fyrrnevndu, munnu tey í Vági ynskja sær, at toppskjúttin í øllum førum verður klárur, áðrenn útidysturin í Klaksvík er á skránni.



**Við einum knúsandi sigri í seinna upp- og niðurflytingardystinum staðfesti Skála, at munurin millum fyrstu og aðru deild er ovurstórur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Skálafólk høvdu leitað sær niðan á vøllin leygardagin. Hóast veðrið loksins var til tað, so mátti fjallgongan bíða í øllum førum ein dag afturat, tí dysturin leygardagin kom fram um at kalla alt annað. Sessurin í bestu deildini stóð upp á spæl, og í sjálvum sær er tað einki minni enn eitt bragd, at liðið yvirhøvur hevði togað seg somikið væl upp.

Trý umfør fyri kappingarlok stóð í øllum førum einki serligt til, men tríggir sigrar á rað høvdu tó koppað øllum á, og við einum 1-1 javnleiki á Tvøroyri í fyrra dystinum sum barlast, mundu vónirnar vera heilt góðar, nú seinasta takið skuldi takast.



*Jonhard Frederiksberg hevur júst skorað eitt av sínum fýra málum, og saman við liðfeløgunum fegnast hann um, at plássið í deildini nú er púrasta víst*

Skála-TB 7-0 (3-0):

# Klassamunur

## Klassamunur

Og lat tað verða sagt beinanvegin, at Skála ikki hevði nakrar sum helst trupulleikar við at halda fast um sessin, tá alt kom til alt. Fyrstu løtuna leikaði kanska nóg so javnt á, men tað var skjótt sjónligt, at heimaliðið var betri fyri enn gestirnir.

Munurin á leikferðini í fyrstu og aðru deild kom beinan vegin greitt til sjóndar, og tó at TB hevur einar tveir-tríggjar spælarar, sum megna at umstilla seg til skjótaru leikferðina, so var hetta ongantíð nóg mikið. Gaman í hevði TB fyrstu løtuna onkran hendinga møguleika, men tað var Skála, sum hótti, og tað var ikki annað enn væntandi, tá teir eftir góðum korteri fingu lagt seg á odda. Men fyri TB mundi mátin, sum hetti hendi uppá, koma illa við. Jonhard Frederiksberg elti afturlegging til TB-málverjan, og tó hesin skuldi sparka burtur, traff hann Jonhard beint í dintilin, og so var lag á manni at rætta kósina á bóltinum, soleiðis at hann sneiddi inn um stólpan.

Og so var Skála á vinnarakós. Jonhard Frederiksberg fekk eina sanna perlu til 2-0, tá hann eftir bandaspæl á brotsteigarmarkinum langaði bóltin upp undir nettakið, og tá Alexandur Johansen elegant lyfti upp um málverjan til 3-0, stóð skriftin á vegginum við neon-stavum.

Undan triðja málinum hevði TB tó gyltan møguleika at birta sær vónina aftur. Óli Johannesen varð togaður niður í brotsteiginum, og brotsspark varð dømt. Óli skeyt sjálvur, men Eugen Voda, sum fyrst hevði fingið gult fyri at provokera eitt sindur, tveitti seg til vinstru og vardi. Dómarin metti tó, at málverjin hevði flutt seg av linjuni áðrenn skoti, men tó at Óli fekk nýggja roynd, og tó at hesa ferð sendi móti hinari síðuni, so vardi Voda aftur fyri. At hann hesaferð í nógv størri mun flutti seg av strikuni, tóktist dómarin tó ikki at lata við seg koma, og so fekk TB ikki gjørt nógv meira.



*TB fekk ein møguleika at koma íaftur dystin, tá Óli Johannesen varð togaður niður í brotsteiginum, men hóast hann fekk tvær royndir, so megnði landsliðsskiparin ikki at skora*

## Eyðmýking

Um TB hevði nakra vón eftir steðgin, skal vera ósagt, men taktiskar flytingar tóktust í hvussu so er benda tann vegin, at nú skuldi alt satsast. Ikki minst tað at Óli Johannesen varð fluttur longur niðan, skuldi kanska økja um trýstið á Skála, men úrslitið av hesum gjørdist ongan tíð sjónligt.

Skála tóktist ikki nervast tað minsta av hesum, og tá Jonhard so skeyt sítt triðja mál, bendi tað tann vegin, at talan kundi gerast um sanna eyðmýking fyri TB. Tað gjørdist tað eisini, men tað var tó ikki fyrr enn í seinastu minuttunum, at talan veruliga gjørdist um sorl. Jonhard slapp enn einaferð á talvuna, áðrenn hann varð klappaður av vøllinum. Hanus Thorleifsson økti til 6-0, tá Alexandur frekt rullaði tvørturum, tá hann varð leysur við málverjanum, og at enda kundi Alexandur sjálvur staðfesta eyðmýkingina. Aftur gjørdist hann púra leysur innan fyri fløtu TB-verjuna, og hesa ferð lyfti hann elegant upp um málverjan, áðrenn leiðin gekk út til hornaflaggið, har ein sonn jubel-scena kundi haldast. Troyggjan varð hongd upp á hornaflaggið, og so var bara at veittra í paradu-stíli frammanfyri fagnandi áskoðarunum.

Løtu seinni bríksladi Birgir Sondum fyri seinastu ferð, og so var alt liðugt. Skála er framvegis í fyrstu deild, og aldursforsetin mátti enn einaferð ásanna, at tað er ovurstórur munur á teimum báðum bestu deildunum.

### Dysturin í tølum

**Skála-TB 7-0 (3-0)**
Skála vinnari við samanlagt 8-1
1-0: Jonhard Frederiksberg
2-0: Jonhard Frederiksberg
3-0: Alexandur Johansen
4-0: Jonhard Frederiksberg
5-0: Jonhard Frederiksberg
6-0: Hanus Thorleifsson
7-0: Alexandur Johansen
Dómari: Birgir Sondum. Hevði fyri tað mesta gott tak á, men lat onkursvegna TB sleppa ókeypis avstað við tveimum óvanliga grovum fríspørkum seinastu løtuna.

Skála: Eugen Voda - Dusan Jaic, Arnold Berg, Hanus Thorleifsson, Jonhard Frederiksberg (Teitur Joensen, 84), Alexandur Johansen, Julian Florescu, Pauli G. Hansen, Bogi Gregersen, Bárður Danielsen, Bent Djurhuus
TB: Magni Hentze - Jón Johannesen, Óli Johannesen, Jens Rói Sørensen, Olivur Abrahamsen, Bárður Dimon (Birgir Rasmussen, 80), Einar Petersen (Mortan Enni, 30), Rasmus Nolsøe, Hallur Christiansen, Kaj Roest (Allan Poulsen, 66), Dan Mortensen